# Eingin dagrøkt í Kollafirði

*Sáttmálatræta ger, at børnini í kommunalu dagrøktini í Kollfirði ikki slepa í vanligu dagrøktina í løtuni*

**Kollafjørður:** Ósemja millum Føroya Arbeiðarafelag og Kollafjarðar kommunu um lønarviðurskiftini hjá dagrøktarmammunum í Kollafirði ger, at dagrøktarbørnini ikki verða ansað í løtuni. Føroya Arbeiðarafelag og Kollafjarðar Arbeiðsmannafelag hava noktað dagrøktarmammunum at arbeiða, til viðurskiftini eru greidd.

Føroya Arbeiðarafelag sigur í tíðindaskrivi, at partarnir samráddust um málið og vóru um at semjast. Men á fundi 22. august tyktist Kollafjarðar Kommuna at hava kúvent og vildi ikki góðtaka tað, tey annars høvdu tosað um, verður sagt í tíðindaskrivinum.

Í sama tíðindaskrivi verður róð fram undir, at tað er lønardeildin hjá Tórshavnar Kommunu, sum hevur lopið split í.

Kollfjørður verður á nýggjárinum partur av Tórshavnar Kommunu, og har skulu somu viðurskifti vera galdandi.

Føroya Arbeiðarafelag setti Kollafjarðar Kommunu freist til mikudagin klokkan 16.00 at koma við svari til uppskot felagsins. Men einki endaligt svar kom, og frá hósmorgni klokkan 07.00 hava Føroya Arbeiðarafelag og Kollafjarðar Arbeiðsmannafelag lýst arbeiðssteðg fyri dagrøktarmammurnar í Kollafirði.

**ej**

# Tunnilsútgerð komin

*Eitt norskt farmaskip var hósmorgunin á Kollafirði við ymsari útgerð, sum brúkast skal í samband við tunnisgerðina undir Vestmannasund*



*Hósmorgunin var eitt norskt farmaskip á Kollafirði við útgerð til tunnilsarbeiðið í Leynum*
*Mynd: Edvard Joensen*

**Kollagjørður:** Tað liggur eitt blátt farmaskip, skrásett í Bergen, við bryggjuna á Lnagasandi í Kollafirði. Á dekkinum standa ein gravimaskina og ein rúgva av arbeiðsskúrum.

Talan er um útgerð, sum skal flytast til arbeiðsplássið oman fyri Leynar, har tunnilsmunnin til undirsjóvartunnilin undir Vestmannasund skal verða.

Hendan útgerðin, sum komin er, er bara partur av teirri útgerð, brúkast skal, nú byrjað verður at bora undir Sundið. Restin, tann tunga útgerðin, kemur í næstu viku, frætti Sosialurin á bryggjuni á Langasandi hendan morgunin.

**ej**

**Lesið eisini Sosialin á Internetinum**
**www.sosialurin.fo**

# Tryggur hann situr í sæti

*Í 40 ár hevur Hanus A. Samuelsen undirvíst á Føroya Studentaskúla, og hann heldur fram*

Edvard Joensen



*Í ein mansaldur hevur Hans A. Samuelsen undirvíst á Føroya Studentaskúla*
*Mynd: Edvard Joensen*

**Hoydalar:** Trúgvur hevur hann verið í tænastuni, Hanus A. Samuelsen í Hoyvík. Í samfull 40 ár hevur hann undirvíst á Føroya Studentaskúla.

Hanus A. Samuelsen tók lærarapróg v á Føroya Læraraskúla í 1960 og hevur síðan undirvíst á Føroya Studentaskúla. Fyrstu tvey árini á VBV á Skansavegnum og síðan í Hoydølum, bæði á Sanatoriinum og síðan 1965 á Føroya Studentaskúla í Hoydølum, har hann framvegis undirvísir.

Hanus A. Samuelsen er giftur við Helenu Samuelsen, og eru tey bæði kend frá millum øðrum arbeiði teirra í felagnum Javna, har Helena nógv av sjeytiárunum var formaður.

Eisini á øðrum økjum enn innan skúlagátt hevur Hanus A. Samuelsen verið virkin. Hann hevur millum annað verið deknur. Bæði í Húsavíkar Kirkju, haðani hann er ættaður, og í Havnar Kirkju. Umframt hevur hann, saman við millum øðrum konuni Helenu, skrivað fleiri bøkur.

Tað munnu vera túsundtals næmingum, Hanus A. Samuelsen nú í næstan ein mansaldur hevur undirvíst í føroyskum máli og mentan.

Tá skúlaárið byrjaði aftur eftir summarfrítíðina, varð Hanus heiðraður á samkomu á Studentaskúlanum í Hoydølum.

Tíðindablaðið Sosialurin fer at prenta samrøðu við Hanus A Samuelsen í seinni blaði.

# Mykinesmenn hava verið eftir grásúlu

*Súlan hevur tað gott í Mykinesi og er í framgongd. Hóast nógv fórst av brimi í summar, fingu teir heilt hampiligt, tá teir vóru eftir grásúlu mikudagin*

Edvard Joensen



Mikudagin vóru mykinesmenn eftir grásúlu í Dranginum. Teir fingu 43 súlur, sigur Oskar Joensen í Mykinesi. Hetta heldur hann, eftir umstøðunum, vera í lagi, tí tað fór rættiliga nógv út av brimi annan hvítusunnudag.

Oskar Joensen sigur frá eldri mykinesfólki, at tey hava ongantíð upplivað slíkt brim um summarið, sum tað, ið var annan hvítusunnudag í ár. Fuglurin var lagstur, og nógv, bæði súla og rita, skolaði stutt og greitt burtur.

Oskar Joensen sigur, at ætlanin er at fara í bergið eftir grásúlu, fyrsta líkindi verða. Tað krevst kyrra, og streymurin skal helst ikki vera ov harður heldur, tí teir plaga at kasta á sjógv og so taka upp við báti.

Um súluna sigur Oskar Joensen annars, at vísindaligar kanningar vísa, at samlaði súlustovnurin í Norðuratlantshavi er í menning. Vøksturin er eitt til trý prosent árliga, siga kanningarnar. Og eisini í Mykinesi er framgongdin sjónlig, sigur Oskar Joensen.

Hann sigur, at í einum stað, har tað fyri umleið 40 árum síðan vóru tvey pør, telja teir í dag 50 pør. Og á Oyðirókini, teir kalla, er heilt fitt av ungsúlu komin at sita.

So hjá súluni sær bara væl út í Mykinesi, metir Oskar Joensen.



# Tvískatta-avtalan undirskrivað

*Føroyingar kunnu búgva í Føroyum og starvast í Grønlandi, uttan at hetta merkir eina eyka skattabyrðu. Føroyar og Grønland skrivaðu fyrradagin undir avtalu, sum loysir tvískattastøður landanna millum*



*Karsten Hansen, føroyskur landsstýrismaður í fíggjarmálum, og Josef Motzfeldt, grønlendskur landsstýrislimur í búskaparmálum, skrivaðu í gjár undir tvískattasáttmálan í Igaliku í Suðurgrønlandi*

John Johannessen

Allir føroyingar kunnu nú fara til Grønlands at arbeiða, uttan at skula verða skattaðir í báðum londum. Somuleiðis, sum grønlendingar eisini kunnu koma til Føroya at arbeiða undir somu treytum.

Hetta er greitt eftir at londini bæði fyrradagin skrivaðu undir ein tvískattasáttmála.

Tað vóru Karsten Hansen, landsstýrismaður fíggjarmálum, og grønlendski landsstýrislimurin í búskaparmálum, Josef Motzfeldt, sum skrivaðu undir avtaluna í Igaliku í Suðurgrønlandi.

Tvískattasáttmálin kemur í gildi 1. januar í 2001.

### Var bert fyri sjómenn

Síðani í áttatiárunum hava føroyingar og grønlendingar bert havt eina skattaavtalu, ið hevur verið galdandi fyri sjómenn.

Hendan avtalan innibar, at føroyskir sjómenn, sum vóru búsitandi í Føroyum, kundu vinna sær pening við grønlendskum skipum uttan at skula rinda skatt í Føroyum. Somuleiðis kundu grønlendskir sjómenn vinna sær pening við føroyskum skipum uttan at skula rinda skatt í Grønlandi.

Nýggja avtalan fevnir um allar borgarar og øll sløg av inntøkum. Sostætt kann ein vanligur føroyskur verkamaður búsitandi í Føroyum starvast í Grønlandi uttan at skula rinda skatt í Grønlandi. Viðkomandi skal eftir nýggju avtaluni bert rinda skatt í Grønlandi.

Somuleiðis kann ein grønlendingur gera tað sama í Føroyum.

Áðrenn avatalan fyri sjómenninar kom í lag, vóru sjómenn noyddir at gjalda skatt í báðum støðum, og førdi hetta við sær, at fleiri teirra fluttu av landinum til Grønlands.

### Gjørdur uttan um Danmark

Tvískattasáttmálin millum Føroyar og Grønland er gjørdur beinleiðis millum Føroyar og Grønland, sum tveir sjálvstøðugar partar av skattaøkinum. Avtalan er ikki partur av nakrari danskari avtalu og heldur ikki partur av nakrari norðurlendskari avtalu.

Grønland hevur higartil ikki vilja verið við í felags tvískattaavtaluni millum Norðurlond. Grønland hevur bert havt slíka avtalu við Danmar, og hevur heldur ikki ynskt at gjørt avtalu við Føroyar fyrr enn nú.

Fyri nøkrum árum síðani samdust føroyingar og grønlendingar um eina neyðloysn á skattaøkinum. Men hendan avtalan hevur ikki virkað nóg væl.

Nýggja tvískattaavtalan skal eftir øllum at døma loysa allar kendar tvískattastøður millum londini bæði.

### Hittast á hvørjum ári

Í sambandi við, at tvískattasáttmálin skuldi undirskrivast, hevur Karsten Hansen, landsstýrismaður í fíggjarmálum, saman við konu sínari, Gulbrit, verið á almennari vitjan hjá grønlendska landsstýrisliminum í búskaparmálum.

Landsstýrismenninir báðir hava nú avtalað, at teir skulu hittast á hvørjum ári at røða um politiskar og fyrisitingarligar spurningar á skattaøkinum.

Báðir landsstýrismenninir siga seg hava ynski um, at gjørda avtalan kann vera við til at fasthalda og styrkja samstarvið millum Føroyar og Grønland, eisini á øðrum økjum enn skattaøkinum.

# Torførar samráðingar við russar

*Samráðingarnar við russar um fríhandilsavtalu ganga ikki so væl, sum væntað*

John Johannessen



*Russisku samráðingarleiðararnir vóru ikki eins léttir at syfta, sum føroyingarnir høvdu væntað*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Nógv bendir á, at samráðingarnar um fríhandilsavtalu við Russland, ikki ganga eins væl, og føroyingar høvdu ætlað. Aftur í gjár sótu føroyingar og russar við samráðingarborðið í Sjó- og Vektarbúðini í Tinganesi. Hetta var annar dagurin, teir samráddust um fríhandilssáttmála, og tá Sosialurin fór til prentingar beint eftir døgurða var enn eingin semja fingin í lag.

Upprunaliga væntaðu Føroyingar, at samráðingarnar fóru av verða léttar. Talan skuldi bert vera um ein skjótan samráðingarfund, har nakrar orðingar skuldu setast inn í eina avtalu.

Samráðingarfundurin skuldi vera í vár, men tá kundi russiska samráðingarnevndin ikki møta. Í tí sambandinum segði føroyski samráðingarleiðarin, Herluf Sigvaldson, at avtalan var so gott sum fingin í lag.

Nú farið er undir samráðingarnar vil Herluf Sigvaldsson ikki gera nakrar viðmerkingar til málið. Men Sosialurin skilir úr Tinganesi, at alt higartil ikki hevur gingist sum ætlað.


